# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*Mikudagin 19. januar fingu Ann-Mari Egholm og Mads H. Jespersen, Vestmanna, ein son. Hann vigaði 3500 gr. og var 54 cm langur.*

15. desember fingu Fríða Larsen, Lamba, og Helgi Højgaard, Søldarfjørður, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4200 gr.

18. januar fingu Hertha S. M. Johannesen og Finn á Svøð, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4050 gr.

21. januar fingu Poula Árnadóttur Lervig og Bárður Larsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3800 gr.

22. januar fingu Heidi og André Joensen, Vágur, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3700 gr.

23. januar fingu Randi og Torbjørn Lisberg, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3730 gr.

27. januar fingu Malan B. Hansen og Petur av Kák, Argir, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4200 gr.

28. januar fingu Maria og Reindolf Deku, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3450 gr.

30. januar fingu Marjun og Henning Hansen, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4050 gr.

31. januar fingu Anna Nygaard og Trygvi Sigurðsson, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3750 gr.

1. februar fingu Rúna Niclasen og Torkil Hellisá, Streymnes, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3770 gr.

1. februar fingu Laila W. Saxow og Eyðun K. Mouritsen, Argir, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4000 gr.

2. februar fingu Marita Wolles og Henning Ljósstein, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4470 gr.

## Prógv



Katrin Einarsson Hensiudóttir, Tórshavn, hevur tann 28. januar 2010 lokið prógv sum professionsbachelor í fysioterapi á Skodsborg Fysioterapiskole, Professionshøjskolen UCC.

# Jógvan Davidsen 100 ár



Sunnudagin 7. februar fyllir Jógvan Davidsen, Elduvík, 100 ár. Jógvan er føddur 7. februar 1910 í Haldarsvík, mamman Maria Dahl, var úr Oyndarfirði og pápin David Davidsen úr Tjørnuvík. Jógvan átti eina systir Astrid, og ein beiggja Hans. Sum tvey ára gamal, kom Jógvan til Elduvíkar til mostur sína Andreu og mann hennara Sofus Haraldsen at verða, tí mamma hansara var sjúk. Andrea og Sofus áttu eingi børn, men seinri fingu tey ein son Alfred, so teir vuksu upp saman sum brøður. Tá Jógvan var 9 ára gamal druknaði fosturpápi hansara, Sofus, hann fórst saman við fimm øðrum elduvíkingum við Ognarbátinum 8. februar 1919, hinir sum fórust vórðu Poul Johs. Poulsen, Johannes Garðshorn, Marius Garðshorn, Hans Henrik Høgnesen og Joen Henrik Høgnesen Tveir mans bjargaðust Johan Haraldsen og Sivert Høgnesen, hettar var ein stórur smeitur fyri alla bygdina, tá bleiv nógv at gera hjá einum 9 ára gomlum dreingi, har skuldi veltast, hoyggjast, skera torv og mangt annað.

Jógvan fór til skips 14 ára gamal, seinri fór hann á maskinskúla í Havn, tá hann var í 20'unum, fór hann í læru á maskinverksmiðjuni Tuxham í Keypmannahavn og gjørdist maskinsmiður. Jógvan giftist í 1937 við Gerdu Jacobsen úr Thisted, tey búsettust í Keypmannahavn, og fingu trý børn, Dianu, Stig og Hjørdis. Abbabørnini eru 6 í tali og langabbabørnini eru 8.

Nøkur ár eftir at kona hansara Gerda, sum andaðist í 1970, og pápi mín Jógvan Garðshorn, sum andaðist í 1979, fingu mamma mín Elspa og Jógvan samband við hvønn annan, tey kendust, bæði vóru jú úr Elduvík. Hann flutti aftur til Elduvíkar í 1983. Jógvan er ein ógvuliga fittur maður, og hevur verið ógvuliga virkin til sín aldur, dámdi sera væl at fáast við krýatúr, seyð, høsn og dunnur. Eisini knýtti hann teppir. Bát fekk hann sær eisini, og hevði hann mangar góðar løtur í honum. Mamma og Jógvan fingu nøkur góð ár saman, mamma andaðist í 1994.

Jógvan flutti í Sambýlið á Skála í 2000, har treivst hann sera væl. Í 2006 flutti hann á Eysturoyar røktar- og ellisheim, har hann nú er, og er glaður fyri at verða. Familjan í Danmark er trúgv at vitja hann, eftir at hann flutti aftur til Føroya at búgva.

Nú hann fyllir 100 ár, kemur meginparturin av familju hansara í Danmark at halda henda stóra dag saman við honum. Opið hús verður á Eysturoyar røktar- og ellisheimi sunnudagin 7. februar millum Kl 15 og 17. Eg og mín familja ynskja Jógvani hjartaliga tillukku við degnum.

**Eleina**

## Merkisdagar

**50 ára føðingardagur**
18. feb. verður Símun Poulsen, Bøgøta 15, Klaksvík, 50 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 20. feb í Skálanum frá kl. 17, har øll eru hjartaliga vælkomin. Tey í vilja gleða Símun við at koma í føðingardag, kunnu siga frá á tlf. 221265 ella 220109 innan 14. feb.

**80 ára føðingardagur**
Mánadagin 1. feb. verður Hans Poulsen, Klaksvík, ættaður av Eiði, 80 ár. Føðingardagurin verur hildin 6. feb. hjá dótturini í Kristiansgøtu 37, Hoyvík frá kl. 17.

**80 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 5. feb. verður Leivur Ellingsgaard, optikkari, ursmiður, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin í Skálanum frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúðleyp**
Hósdagin 4. feb. hava Oda og Árni Frederiksberg, á Strondum, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin fíggjakvøldið 19. feb. frá kl. 18 í Kelduni í Skálafirði.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 5. feb. hava Aðalbjørg og Sigurd Joensen í Oyndarfirði diamantbrúðleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 6. feb., kl. 15, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Prógv**
27. jan fekk Elisabeth Dorthea Benjaminsen prógv sum Ergoterapeut á Professionshøjskolen Metropol ì København.

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Jens Michael Jensen, vanliga nevndur Lillego**, fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjakvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju leygardagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini. Í staðin fyri blómur ella krans kann peningagáva latast til Føroya felag móti Krabbameini.

**Herman B. Hermansen, Tórshavn, ættaður úr Hósvík**, andaðist týsdagin 2. februar, 76 ára gamal. Jarðarferðin verður leygardagin 6. februar kl. 13 úr Hósvíkar kirkju. Tey, ið vilja minnast Herman, kunnu lata LÍV, sjálvbodna bjargingarbátinum, eina gávu. Konta í Eik.

## Dagurin

**5. februar. Ata**, deyð umleið ár 250. Henda vakra unga gentan í Cataniu á Sikiloy vildi ikki lovast heidnum fríggjara, av tí at hon var kristin, og varð eftir ræðuligar pínslur tikin av døgum. Grikst navn, Agata, sum merkir tann góða.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*